Kunngerðablaðið A

2014 Givið út 19. desember 2014

Nr. 119 15. desember 2014

**Løgtingslóg**
**um**
**avgjald á veiðu av makreli og norðhavssild í 2015**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

*Veiðigjald*

**§ 1.** Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi skal rinda eitt veiðigjald, sum verður lagt á hvørt fiskað kilo í rundari vekt av norðhavssild og makreli, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til annaðhvørt norðhavssild ella makrel í 2015.

*Stk. 2.* Veiðigjaldið er ávikavist

1) kr. 0,50 fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av norðhavssild, og
2) 1 króna fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av makreli.

*Stk. 3.* Veiðigjaldið fer í landskassan.

**§ 2.** Veiðigjaldið, sbrt. § 1, er ikki galdandi fyri eigarar av fiskiførum á føroysku landleiðunum, sbrt. § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

*Avreiðingargjald*

**§ 3.** Afturat veiðigjaldinum, sbrt. § 1, skal eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi rinda eitt avreiðingargjald, sum er kr. 2 fyri hvørt kilo í rundari vekt av norðhavssild og makreli, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til annaðhvørt norðhavssild ella makrel í 2015, og sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar.

*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 skulu eigarar av fiskiførum á føroysku landleiðunum, sbrt. § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, rinda eitt avreiðingargjald, sum er kr. 1 fyri hvørt kilo í rundari vekt av norðhavssild og makreli, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til annaðhvørt norðhavssild ella makrel í 2015, og sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar.

*Stk. 3.* Avreiðingargjaldið, sbrt. stk. 1 og 2, verður ikki lagt á veiðu, sum fiskifarið letur skipi undir fremmandum flaggi, sum flytur veiðuna til virkingar ella frystingar til virki á landi í Føroyum, ella til virkingar ella frystingar til móttøkuskip undir føroyskum flaggi.

*Stk. 4.* Avreiðingargjaldið fer í landskassan.

*Umrokning til runda vekt*

**§ 4.** Í sambandi við avgjaldið, sbrt. §§ 1 og 3, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta nærri reglur um umrokning av veiðu til runda vekt.

*Innkrevjing*

**§ 5.** Veiðigjaldið, sbrt. § 1, og avreiðingargjaldið, sbrt. § 3, fella til gjaldingar so hvørt, veiðan er avreidd.

*Stk. 2.* Fiskiveiðieftirlitið ger upp veiðigjaldið og avreiðingargjaldið og sendir eigara av fiskifarinum rokning mánaðarliga.

*Stk. 3.* Gjaldsfreistin er 10 dagar eftir dagfesting á rokning.

*Stk. 4.* Rinda eigarar av fiskiførum ikki rættstundis, skal renta rindast við 1% fyri hvønn byrjaðan mánað.

*Stk. 5.* Veiðigjaldið og avreiðingargjaldið, umframt renta og møguligur innkrevjingarkostnaður av hesum, kunnu krevjast inn við panting. TAKS fremur panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum.

*Gildiskoma*

**§ 6.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2015.

Í Tinganesi, 15. desember 2014

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 18/2014